# Vert at hugsa um áðrenn tú byggir



## Vel gott tilfar, tá verður tú glaðari fyri úrslitið

**Húsfólk:**
Hans Jákup og Kirstin Langgaard og fimm børn

**Hvar eru húsini?**
Hoyvík

**Slag av húsum:**
Arkitektteknað – alt í betongi

**Hvør smíðar?**
Byggifyritøka og sjálvi

**Góð ráð til teirra, sum fara undir at byggja:**
■ Hoyr teg fyri hjá øðrum um, hvørjir handverkarar eru góðir, tí ein góð avtala er onki verd, um handverkararnir eru vánaligir.
■ Bið ikki um stórar ordrar uppá tímaløn.
■ Vel gott tilfar, tá verður tú glaðari fyri úrslitið
■ Ger eitt modell av húsinum áðrenn farið verður undir arbeiðið. Vit síggja nú, at um vit høvdu gjørt tað, so hevði okkurt verið øðrvísi nú.



## Byggið rør og tilíkt inn í veggirnar, so verður lættari at halda húsini

**Húsfólk:**
Sólvá Eystberg og Geir Wardum – trý børn og fjórða er á veg

**Hvar eru húsini?**
Í Gundadali í Tórshavn

**Slag av húsum:**
Arkitekteknað

**Hvør smíðar?**
Mest handverkarar

**Góð ráð til teirra, sum fara undir at byggja:**
■ Síggj til, at hava eina tíðarætlan fyri ymsu handverkararnar. Tað er skjótt, at øll standa og bíða hvør eftir øðrum
■ Byggið rør og tilíkt inn í veggirnar, so verður lættari og snøggari at halda húsini, eitt nú at mála og gera reint.
■ Fáið tykkum luftanlegg. Hús í dag eru so tøtt, at inniluftin verður slavin
■ Fylgið væl við í rokningunum, tað er lætt at missa yvirlitið. Eitt nú um áogn verður mótroknað, og um tilboð halda
■ Tryggið tykkum, at treytirnar fyri eykaarbeiði eru avtalaðar frammanundan, so tað ikki kemur óvart á tykkum aftaná.